## Fólkaskúlaráð til verka

Fólkaskúlaráðið hevur leingi verið óvirkið, men í broytingaruppskotinum til fólkaskúlalógina, sum varð samtykt fríggjadagin, varð álagt landsstýrismanninum at fáa ráðið at virka aftur. – Fólkaskúlaráðið verður sett aftur sum skjótast. Hvørji skulu sita í tí, fara vit at viðgera nærri, segði Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í skúlamálum, sambært heimasíðuni hjá Lærarafelagnum, undir aðru viðgerð av broytingaruppskotinum. Í grein 58 í fólkaskúlalógini stendur, at landsstýrismaðurin setur eitt fólkaskúlaráð. Fólkaskúlaráðið gevur landsstýrismanninum ráð í øllum málum um fólkaskúlan.



## 3% færri um floghavnina

Fyri fyrstu ferð í 14 mánaðar er ferðafólkatalið minni enn sama mánaði árið frammanundan. Í mai í ár eru 19.333 ferðafólk farin og komin um floghavnina. Hetta er 3,2% færri enn í mai í fjør, tá talið var 19.975, skrivar stendur at lesa á heimasíðuni hjá Flogvøllinum. Í mai hevur verið afturgongd á øllum farleiðum uttan til Danmarkar, har ein lítil vøkstur hevur verið uppá 1,4%. Á Noregsleiðini hevur afturgongdin verið 46,6%, Íslandsleiðini 26,6%. Stórabretland hevur havt sama ferðafólkatal.

# Formenn í skugga

**Jan Christiansen, býráðslimur í Havn, heldur tað vera púra burturvið, at Heðin Mortensen og Edmund Joensen hava samstarvað um nýtt tinghús, uttan at býráðið hevur verið kunnað um málið yvirhøvur**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*Heðin Mortensen hevur skaltað og valtað við pengunum hjá skattaborgarunum í fleiri ár nú, men eg helt, at Edmund hevði meira skil enn hetta. Og hetta projektið kemur ikki at kosta 122 milliónir, tað sær ein og hvør við einum hálvum eyga. Tað kemur nærri at kosta minst 200 milliónir, sigur Jan Christiansen.*

Hóast Jan Christiansen fegnast um fagra veðrið í morgun, er hann ikki sørt skakaður av tíðindunum um nýtt tinghús, sum býráðið varð kunnað um fríggjakvøldið.

- Ongin býráðslimur hevur verið kunnaður um hesa risa verkætlan. Her er talan um skuggaspæl hjá Heðini Mortensen, og tað kann ikki vera rætt í einum demokratiskum samfelag, sigur Jan Christiansen, sum umframt at vera umboð fyri Fólkaflokkin í Tórshavnar Kommunu, eisini er 2. varaborgarstjóri og fyrrverandi borgarstjóri í Havn.

Hann greiðir frá, at býráðið fyrstu ferð varð kunnað um málið fríggjakvøldið, tá býráðslimir í skundi vórðu innkallaðir til fundar, tá løgtingið eisini varð kunnað á fyrsta sinni. Talan er um ætlanirnar hjá Edmundi Joensen, tingformanni, og Heðin Mortensen, borgarstjóra í Havn, um at Tórshavnar Kommuna skal keypa verandi tinghús við umsitingarbygningi, og at tingið so skal byggja nýtt niðri á Eystaru Vág. Sambært Heðin Mortensen, kundi býráðið keypt fyri 80 milliónir, og nýtt tinghús kemur at kosta landinum 122 milliónir.

### Kommunan byggja

- Her eru fleiri ting, sum bara eru so langt úti, at tað finnast ikki orð fyri tí, sigur Jan Christiansen við Sosialin. Og hann greiðir frá, at í fyrsta umfari kann hann als ikki góðtaka, at býráðið ikki hevur verið við í arbeiðinum frá fyrstu tíð, umframt at hann heldur tað vera burtur úr vón og viti at leggja Eystaru Vág undir heilt.

- Hetta málið fær ikki undirtøku í býráðnum. Tað kann eg leggja høvdið á blokkin uppá, sigur Jan Christiansen. Hann heldur eisini, at tað er burturvið, at løgtingshúsið enn ikki er liðugt umvælt, so finnur formansskapurin útav, at tað er óegnað.

- Og so at rokna við, at kommunan bara kann keypa tað fyri einar 100 milliónir. Men tað er kortini lætt at skilja, at Edmund Joensen vendir seg til kommununa, tí hon hevur keypt ognir upp púra vilt seinasta árini. Til dømis Degns Hús fyri 5 milliónir, sum nú vera sett í stand fyri 1,5 milliónir. Nógvir borgarar venda sær til kommununa um at keypa bygningar, tí hon hevur lagt eitt so høgt støði, sigur Jan Christiansen.

Spurdur um tað ikki er tiltrongt at umsitingin verður savnað á einum stað, sigur hann tað vera rætt.

- Men tað hevði verið meira hóskandi, at kommunan byggir okkurt nýtt sjálv. Okkurt, sum tekur støði í tørvinum hjá kommununi og verður bygt til endamálið.

### Tign valdast

Tað hevur verið ført fram, at landið hevur tørv á einum tignarligum tinghúsi. Hvat heldur Jan Christiansen um tað?

- Tignarligt og tingnarligt, tað valdast. Heldur áttu fólk at lært av 80'inum. Heðin Mortensen hevur skaltað og valtað við pengunum hjá skattaborgarunum í fleiri ár nú, men eg helt, at Edmund hevði meira skil enn hetta.



*Tekningin av nýggja tinghúsinum, sum Palli Gregoriussen hevur teknað: Bygningurin verður á Eystaru Vág og sjálvur tingsalurin á Bursatanga. Vestantil verður eitt framhald av Áarvegnum einar 100 metrar út á Bursatanga. Bygningurin er í trimum hæddum, har stór framsýningarhøll verður á veghæddini, og parkeringskjallari við 52 básum. Ein løtt stálbrúgv verður av Bursatanga og yvir í túnið hjá Skibssteds pakkhús. Á sjálvum Bursatanga skal eitt stórt listaverk standa.*
*Inni í salinum er ætlanin, at tinglimirnir sita í einum hálvsirkli í trimum hæddum. Íblásturin til hetta kemur úr gamla Grikkalandi.*